umhvørvisstovan
álit, førleiki, viðurkenning

# Mál og avrikssáttmáli 2016
## við **Heilsu- og innlendismálaráðið**

Tá Umhvørvisstovan (US) varð stovnað í 2007, vórðu týdningarmiklar fyrisitingarligar og vitanartungar, almennar uppgávur, sum áður vóru spjaddar, savnaðar á einum stað:

- Umsiting av eigindóms-skráunum **matrikul** og **tingbók**
- **Landsfólkayvirlitið**
- Góðkenningar- og eftirlitsmyndugleiki á **umhvørvis**økinum
- **Gransking** á umhvørvisøkinum
- Útvegan av grundleggjandi tilfari á **kort- og geodata**økinum
- Trygging av burðardyggum plantu- og viðarvøkstri og føroyskum plantutilfari á **skógrøktini**.




Um árskiftið 2015/16 varð orku-økið og el-veitingareftirlitið lagt til US at umsita, og starvsfólkini, sum áður vóru á Jarðfeingi, fluttu út á Argir.

Stovnurin er nú skipaður í 7 fakdeildir við úr 5 upp í 9 starvsfólkum. Ein lítil helvt eru akademikarar og ein triðingur teknikkarar, harav fleiri hava status sum serfrøðingar. Innan **umhvørvisgransking**, á **skógrøkt** og á **orku** eru nøkur størv inntøkufíggjað.

Í mál og avrikssáttmálanum við Heilsu- & Innlendismálaráðið fyri 2016 verður fokuserað upp á niðanfyri nevndu øki:

| | **2016** | **HIMR** |
|---|---|---|
| **Leikluturin hjá US í *Talgildu Føroyum*** | | |
| *Fyrireika og lýsa leiklutin hjá US sum høvuðsveitara av grunddata í mun til verkætlanina **Talgildu Føroyar:*** <br>- *persónsdata* <br>- *ognardata* <br>- *geodata* | skipa projektleiðslu | |
| | lýsa og seta gongd á **talgilding og dátuvask** í mun til tingbók, matrikul og fólkayvirlit | |
| | gera kravlýsing av **nýggjari tinglýsingarskipan** | |
| | Kanna møguleikar fyri at **gera matrikuleru máls-gongdina einfaldari** | |
| | **Fríkeyp/fígging** av tøkum og ókeypis grunddata | |
| **Nýggj lóggáva á náttúru- og lendisøkinum** | | |
| *Saman við Heilsu- og innlendismála-ráðnum at endurskoða umsiting og lóggávu á náttúru- og lendisøkinum.* | **nýggj náttúruverndarlóg** innan karmarnar av fyrisitingarlógini | |
| | **lendisskrá**: løggild skráseting og kunngerð av góðkendum lendisfriðingum- og framtíðar lendisnýtslu | |
| **Styrkt umsiting av umhvørvisáhugamálum á firðum og í sundum** | | |
| *Eftirmeta og endurskoða verandi umsiting og eftirlit av alivirksemi vm. á firðum og sundum* | styrkja **vitanina um dálking** og **árin á vistskipanirnar** sum grundarlag undir loyvisveitingum, treytum til alivinnuna, og eftirlit við virkseminum | |
| | **Marin planlegging** sum partur av landsplanlegging? | |

| Kortmyndugleikin | | |
|---|---|---|
| *Nýtt topgrafiskt kortverk - Føroyakort - verður gjørt í samstarvi við danskar myndugleikar* | saman við HIMR at orða føroyskan **kortpolitikk**, og taka støðu til føroyskan **kortmyndugleika** | |
| | medvirka í framleiðslu og útgávu av **nýggjum topografiskum kortum** saman við *Styrelsen for Dataforsyning og Effektivisering* (SDFE, *áður Geodatastyrelsen)* | |
| **Skógrøkt** | | |
| *Endurskoða bygnarligu viðurskiftini á deildini, sum fevnir um røkt av viðalundum og frílendum og plantualing á Gróðurstøðini* | | |
| | endurskoðan av lóg um viðalundir | |
| | seta "Hoydalsætlanina" í verk | |
| **Orka – nýtt málsøki, umsitið av US** | | |
| *Frá 1. jan. 2016 verða el-veitingarlógin og orkumál umsitin av Umhvørvisstovuni* | virka fyri at alt meiri orka verður vunnin úr varandi orkukeldum heldur enn olju: differentieraðir el-prísir, stuðla grønum orkuloysnum | |
| | uppfylging av Virkisætlan 2014<br>kanning av orkugoymslu/orkutørvi, m.a. *pumped storage* | |
| **Vápnalógin** | | |
| *US skal vegna løgmansskrivstovuna umsita vápnaprógv og skráseting av vápnum samb. broytingum í vápnalógini* | menning av dátugrunni og web-loysn til skráseting av vápnum | |
| | fyrireika mannagongdir til umsiting og veitan av vápnaloyvum, sum skal virka frá 1.1.2017 | |

**Sáttmálaskeið**
Hesin sáttmálin er galdandi fyri árið 2016.
Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsu- og innlendismálaráðnum á heysti 2016.

Tórshavn, tann 29.08. 2016

**Umhvørvisstovan** **Heilsu- og innlendismálaráðið**

____________________________
Petur Nielsen, stjóri

____________________________
Turid Age, aðalstjóri